## Audition til ungdómssending í Kringvarpinum

Skal tú verða vertur í ungdómssendingini MúS, sum Klippfisk framleiðir til Kringvarpið í vetur? Tekna teg til audition í seinasta lagi í morgin, mikudagin 15. okt. Vit leita eftir einum ungum kvinnuligum verti millum 16 og 25 ár. MúS verður framleidd av fleiri ungum nýhugsandi og kreativum fólkum, sum vilja gera eina stuttliga og áhugaverda sjónvarpssending, sum ikki er sædd í Føroyum fyrr. Internetið er nokkso gjøgnumgangandi í sendingini, men hon er tó bestemt ikki nøkur teknik-nørda sending, og tað er ikki neyðugt at vita so nógv um interneti, fyri at vera við. Tað týdningarmiklasta er, at tú er útatvend, smílandi, gott kroppsmál og hevur eina góða rødd. Ljóðar tað spennandi? So kom til audition í Klippfisk 22. oktobur! Tað tú skal gera er, at senda ein teldupost til Klippfisk í seinasta lagi 15. oktobur, har tú skrivar stutt um teg sjálva. Minst til at upplýsa: navn, aldur, bústað og telefonnummar. Viðheft gjarna eina mynd. Vit senda tær síðani ein stuttan audition tekst aftur, og upplýsingar um nær tú skal møta í Klippfisk. Skriva til: klippfisk@klippfisk.fo



# Atlantic Airways skal selja tollfrítt

**- Bæði út frá eini reint fíggjarligari og út frá eini samlaðari meting hevur nevndin í P/F Vága Floghavn mett, at tilboðið frá P/F Atlantic Airways er tað, sum gevur P/F Vága Floghavn bestu og tryggastu úrtøku, sigur nevndin í P/F Vága Floghavn**



*Atlantsflog kann nú bæði selja tollfrítt í luftini og á flogvøllinum í Vágum*

TOLLFRÍTT

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað verður Atlantsflog, sum sleppur at selja tollfrítt á Flogvøllinum í Vágum.

Tað hevur nevndin í Vága Floghavn gjørt av.

Tað var tann 10. september í ár, at tollfría sølubúðin varð boðin út í almennum útboði.

Tá ið freistin at lata inn tilboð var úti tann 1. oktobur 2008 hevði P/F Vága Floghavn móttikið seks boð frá fýra tilboðsgevarum; fýra vanlig boð sambært útboðstreytunum og tvey alternativ boð.

Nevndin í P/F Vága Floghavn hevur nú viðgjørt innkomnu boðini, og hevur gjørt av, at lata P/F Atlantic Airways rættin til at reka tollfríu søluna í Vága Floghavn. Sáttmálin verður galdandi fyri tvey ár, og við rætti fyri partarnar at leingja hendan í upp til eitt ár afturat.

Eftir hetta verður mett, at hølisviðurskiftini í Vága Floghavn verða munandi broytt í sambandi við ætlaðu útbyggingina av flogvøllinum, soleiðis at møguleikar verða fyri enn betur umstøðum fyri tollfríari sølu í Vága Floghavn.

Nevndin í P/F Vága Floghavn vil tí til ta tíð taka støðu til, hvussu tollfría sølan í Vága Floghavn skal skipast, herundir um talan skal vera um fleiri tollfríar sølubúðir.

- Bæði út frá eini reint fíggjarligari og út frá eini samlaðari meting hevur nevndin í P/F Vága Floghavn mett, at tilboðið frá P/F Atlantic Airways er tað, sum gevur P/F Vága Floghavn bestu og tryggastu úrtøku, samstundis sum tilboð teirra gevur teimum ferðandi um flogvøllin bestu møguleikarnar fyri eini nútímans tænastu á høgum støði við fjølbroyttum úrvali av tollfríum vørum, sigur Jóhannus Egholm Hansen, næstformaður í P/F Vága Floghavn, sum nevndarinnar vegna hevur skipað útboðið.

# 14 fólk bjóða seg fram fyri Javnaðarflokkin

**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag hevur gjørt endaliga listan til kommunuvalið í Tórshavnar kommunu. Seks kvinnur og átta menn bjóða seg fram**

KOMMUNUVAL

*Tíðindaskriv*
*Suðurstreymoyar Javnaðarfelag*

Umhvørvi, trivnaðar og ein kommuna fyri øll eru hjartamál hjá Javnaðarflokkinum – og tí eru hetta økir, sum Javnaðarflokkurin serliga fer at arbeiða víðari við í Tórshavnar kommunu komandi árini. Meðan Javnaðarflokkurin hevur havt leiðsluna í Tórshavnar kommunu seinastu fýra árini, er ein sera stór menning farin fram í allari kommununi. Við Javnaðarflokkinum á odda fara vit at halda kósina og tryggja at kommunan støðugt verður ment og at hetta verður gjørt fíggjarliga ráðiligt.

Á listanum hjá Javnaðarflokkinum til kommunuvalið í Tórshavnar kommunu er javnstøða – 6 kvinnur og 8 menn. Á listanum eru bæði dugnaligir politikarar við drúgvum royndum og nýggj, ung spennandi valevnir. Felags fyri valevnini er, at tey eru sera virkin og eldhugað.

Í sambandi við kommunuvalið fara valevnini hjá Javnaðarflokkinuma at skipa fyri eini røð av ymsum tiltøkum. Meira verður at frætta um hetta seinni.

**Valevnini eru:**

1. Bjarni Dahl
2. Elin Lindenskov
3. Halla Samuelsen
4. Hans Martin Hansen
5. Heðin Mortensen
6. Hervør Hansen
7. Hilmar Augustinussen
8. Ingrid S. Henriksen
9. Irdi Danielsen
10. Jákup Danielsen
11. Levi Mørk
12. Maria Hammer Olsen
13. Rúni Djurhuus
14. Sjúrður Johannesen



*Heðin Mortensen, býráðslimur, fyrstu ferð valdur í Tórshavnar Býráð í 1972*



*Elin Lindenskov, býráðslimur, fyrstu ferð vald í Tórshavnar Býráð í 1992*



*Halla Samuelsen, býráðslimur, tók sæti fyri Katrin Dahl Jakobsen, sum varð vald á ting í januar í ár*

# Úttalilsið hjá Vestergaard var óheppið

**Á landsstýrisfundi í gjár var úttalilsið hjá Jacob Vestergaard, landsstýrsmanni í fiskivinnumálum, um at fiskivinnupolitikkurin hjá nýggju samgonguni er snaraður 180 stig til viðgerðar. Semja er um, at "Úttalilsið er óheppið"**

POLITIKKUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Á landsstýrisfundinum í dag umrøddu vit eisini úttalilsið hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum um fiskivinnupolitikkin hjá samgonguni. Landsstýrismaðurin og landsstýrið eru samd um, at úttalilsið er óheppið, tí tað kundi elva til misskiljingar. Landsstýrið hevur eina felags fatan av, at felags stev er neyðugt, segði Kaj Leo Johannesen, løgmaður, eftir landsstýrisfundin í gjár.

Orrustan kom í eftir at Jacob Vestergaard, landsstýrsismaður í fiskivinnumálum, segði, at fiskivinnupolitikkurin hjá nýggju samgonguni er snaraður 180 stig.

Javaðarflokkurin sigur seg ikki góðtaka, at landsstýrismenn koyra solo við privatum útmeldingum, soleiðis sum tey hildu Jacob Vestergaard hava gjørt um fiskivinnupolitikkin hjá samgonguni.

- Fiskidagabankin, sum var eitt aðalmál í síðstu samgongu, kemur ikki upp á tal. Vinnan skal sjálv stýra handlinum við fiskiloyvum, staðfesti Jacob Vestergaard sambært útvarpinum hjá Kringvarpinum.

Orðini fullu ikki í góða jørð hjá Javnaðarflokkinum, og Katrin Dahl Jakobsen, sum er forkvinna í vinnunevndini og talskvinna Javnaðarfloksins í fiskivinnumálum, vildi hava landsstýrismannin í fiskivinnumálum settan upp á pláss.

Málið varð umrøtt í lítlusamgongu, og har gjørdi Javnaðarflokkurin gjørdi púra greitt, at flokkurin ikki finnur seg í, at landsstýrisfólk fara út og koyra solo við sínum privatu útmeldingum, segði Katrin Dahl Jakobsen við útvarpið hjá Kringvarpinum.

Í gjár tók løgmaður so málið upp á landsstýrisfundi, og nú er sambært løgmanni semja um, at "landsstýrissamgongan skal hava felags stev".



*Løgmaður heldur, at úttalilsið hjá Jacob Vestergaard um fiskivinnupolitikkin var óheppið, men semja er um at hava felags stev, sigur løgmaður*